Tíðindablaðið sosialurin Telefon 311820 Telefax 314720 Internetadressa: www.sosialurin.fo e–mail: post@sosialurin.fo

# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og suðri og fyrrapartin regn, annars sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og landsynningi og ælaveður. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Fyrst lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Seinni gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og ælingur. Hitin millum 8 og 12 stig.



# Snildir og raskir seyðhundar

*Stuttlig hundakapping í Kollfjarðardali*

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

**Kollafjørður:** Sunnudagsdøgurðin, brúna sósin og budingurin var ikki meir enn sjúnkað, tá ið fólk møttu fjølment og lin í Kollfjarðardali, at hyggja eftir hvussu væl hundarnir í seyðhundafelagnum dugdu at reka. Tiltakið varð hildið í nýlendinum hjá Búnaðardeplinum í Kollfjarðardali og har venja hundaeigararnir vanliga. Teir hava eisini tríggjar seyðir av Búnaðardeplinum, sum verða nýtti at venja hundarnar við.

Hundarnir eru allir av skotskari ætt, antin innfluttir beinleiðis úr Skotlandi ella undan innfluttum hundum haðani. Skotar hava nýtt hundar til seyðarakstur so langt aftur nakar kann minnast, og teir eru dugnaligir.

– Kappingin sunnudagin var ikki nøkur verulig kapping og vit góvu ikki stig. Endamálið var at fáa eina hóming av hvussu hundarnir royndust og onkur royndist stak væl. sigur Absalon Hansen, ein av oddamonnunum í hundafelagnum.

– Talan var um eina undankapping og 18 hundar luttóku. Teir skuldu reka oman og niðan og eisini upp á tvørs. Hundarnir eru av slagnum Border Collie. Í heyst, aftaná at heystfjøllini eru gingin, verður ein rættulig kapping, har vit fara at finna besta hundin, sigur Absalon Hansen.

Border Collie hundarnir eru fittir og góðsligir, men semja var millum eigararnar í Kollfjarðardali sunnudagin, at teir eru ikki egnaðir sum stovuhundar.

– Seyðhundarnir eru arbeiðshundar og teimum tørva at renna. Tað er synd at steingja teir inni og er eigarin ikki raskur at ganga við teimum, lata teir sleppa at renna, so er tað beinleiðis synd fyri hundin, segði ein av hundaeigarunum.




Lágtrýstið við Føroyar fer spakuliga í útsynning og brúgvalagið yvirNorðsjónum kemur móti Føroyum.




Lágtrýstið vestan fyri Írland stendur mestsum í stað og eitt brúgvalag við Føroyar fer norðureftir.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 13 |
| Tromsø | 9 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 15 |
| Keypmannahavn | 14 |
| Helsinki | 13 |
| Moskva | 13 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 7 |
| Kiev | 10 |
| Bukarest | 22 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 29 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 27 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | – |
| New York | 24 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 22 |




**Hitalagið mált frá 18./09. kl 06[00]–19./09. kl 06[00]. Hitin í gjár: 9,2°C**
Minsti hiti máldur í september: **÷0,5°** Mesti hiti máldur í september: **19,5°**




Avfallið: 30,0 mm – **mált frá 18./09. kl 6[00]–19./09. kl 06[00]**
Avfallið higartil í september: 73,6 mm

## Vestfalskyrrindi

13. sept.: Fullmáni
21. sept.: Seinna kvarter
24. sept.: Mánin næstur jørðini

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. sept. | 11.21 | 23.51 | 10.21 | 22.51 | 10.36 | 23.06 | 00.55 | 13.21 | 01.55 | 14.21 | 09.36 | 22.06 | 08.36 | 21.06 | 11.36 | – | 00.10 | 12.36 | 11.06 | 23.36 | – | 12.21 |
| 21. sept. | – | 12.26 | 11.26 | – | 11.41 | – | 01.51 | 14.26 | 02.51 | 15.26 | 10.41 | 23.23 | 09.41 | 22.23 | 00.06 | 12.41 | 01.06 | 13.41 | – | 12.11 | 00.51 | 13.26 |
| 22. sept. | 01.08 | 13.57 | 00.08 | 12.57 | 00.23 | 13.12 | 03.08 | 15.57 | 04.08 | 16.57 | – | 12.12 | 11.12 | – | 01.23 | 14.12 | 02.23 | 15.12 | 00.53 | 13.42 | 02.08 | 14.57 |
| 23. sept. | 02.49 | 15.41 | 01.49 | 14.41 | 02.04 | 14.56 | 04.49 | 17.41 | 05.49 | 18.41 | 01.04 | 13.56 | 00.04 | 12.56 | 03.04 | 15.56 | 04.04 | 16.56 | 02.34 | 15.26 | 03.49 | 16.41 |

Kelda: Skipalistin 2000